Kyndil-StÍF 16-20 (10-10):

# Minti um botndyst

**Lítil ferð var á kvinnudystinum millum Kyndil og StÍF sunnudagin, har Kyndil innan stutta løtu tveitti møguleikan fyri fyrstu stigunum burtur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Ann Mari Wang og hinar í Kyndli stríddust væl sunnudagin, men tó at tað var nær við, so rakk tað heldur ikki til stig hesaferð*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Higartil hevur árið hjá kvinnusíðuni í Kyndli ikki hilnast nakað serligt. Liðið hevur greitt verið við undirlutan móti bæði Stjørnuni og Neistanum, og tí var ikki væntandi, at tær skuldu gera nakrar stórvegis skreytir móti StÍF sunnudagin.

StÍF vann sær í fjør bronsumerkini, og tó at liðið hevur havt nakað av frágongd síðani, so bendi javnleikurin móti Stjørnuni á, at liðið aftur í ár hevur ætlanir um at vera við í dystinum um heiðursmerkir.

### Mistøk kostaðu

Tað var tó lítið, sum bendi tann vegin sunnudagin. Fyri tað nógva megnaði Kyndil nevnliga fult og heilt at spæla upp til gestirnar, og leingi var tað eisini Kyndil, sum hevði lítla munin, sum var í dystinum.

Við at leggja dentin á verjupartin, har Fríða Petersen eisini var ein góður seinasti skansi, megnaði heimaliðið í trý korter at halda StÍF frá at kalla øllum, og tó at Alina Olaru sær sjálvum líkt megnaði nøkur gjøgnumbrot, so tóktist hetta ikki vera nóg mikið.

Og í álopspartinum sýndi Kyndil eisini, at felagið her hevur nakað at hava framtíðar vánirnar í. Tó at tær enn ikki eiga berandi leiklut á liðnum, so sýndu Randi Wardum og Hildur Mikkelsen í løtum, at tær eiga eina bjarta framtíð á liðnum, og hendan hóttanin frá bakkunum viðførdi eisini størri rásarúm aðra staðni á vøllinum.

Men innan fimm minuttir í seinna hálvleiki misti heimaliðið tó alt á gólvið. Nøkur fullkomuliga óneyðug mistøk førdu fleiri kontramøguleikar til StÍF við sær, og so kundi Beinta Joensen vísa, at hon telist millum tær heilt frægu vongspælararnar í landinum. Tríggjar ferðir fekk hon møguleikan, og hvørja ferð sat bólturin í meskunum, og so var leyst og liðugt.

### Gevur vón

Við sigrinum syrgdu StÍF fyri, at tær framvegis eru við í oddinum, og í so máta man tað vera líka mikið, hvussu tunnur sigurin var. Tað kann tað sum so eisini vera hjá Kyndli, men hinvegin man tað í øllum førum kennast sum eitt stórt stig rætta vegin, at tær hesaferð vóru somikið nær við at fáa stig burturúr dystinum. Megna tær í komandi dystunum at halda fast í grundhugsjónini í spælinum og so sleppa undan býttu mistøkunum, so kann væl vera, at okkurt stigið fer at koma á kontina nakað fyrr enn summi av viðhaldsfólkunum høvdu roknað við.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-stÍF 16-20 (10-10)**
Málskjúttar
**Kyndil:** Ann Mari Wang 5, Anja Heinadóttir 3, Annika Thomsen 2(1), Randi Wardum 2, Anita Kjærbo 1, Sólja Jóannisdóttir 1, Ingrid H. Petersen 1, Jensia Kjærbæk 1
**StÍF:** Alina Olaru 8(2), Milica Ergic 3(1), Beinta Joensen 3, Anna Maria Berthelsen 2, Anna B. Danielsen 2, Paula B. Høgnesen 1, Poula D. Olsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 1, StÍF 3
**Útvísingar:** Kyndil 1, StÍF 2
**Dómarar úr Tjaldri:** Kári Hansen & Trúgvi Mortensen. Høvdu ongar trupulleikar av ferðfátæku uppgerðini.

VÍF-Neistin 22-24 (9-13)

# Málverjin basti VÍF

**Zejko Jotic tók broddin av álopsspælinum hjá VÍF, og so fekk Neistin tvey hampuliga óvæntað stig í trupla útidystinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

At tey í Neistanum vóru ovurfegin eftir dystin móti VÍF sunnudagin er einki at siga til. Besta manslíðið hjá felagnum hevði í trupla útidystinum ognað sær tvey týdningarmikil stig, og í fyrstu atløgu hevur hetta flutt teir upp á ovastu rók á stigatalvuni, har teir saman við grannunum úr Kyndli hava trý stig.

Tað var annars ikki væntandi, at Neistin skuldi gera stórvegis um seg í Vestmanna sunnudagin. VÍF er altíð partur av oddastríðnum í føroyskum manshondbólti, og árið í ár tykist á ongan hátt skula gerast nakað undantak í so máta. Tvørtur ímóti varð roknað við, at vestmenningarnir í ár í enn størri mun skuldu gera seg galdandi, nú Sámal Joensen var komin fyri seg eftir sín skaða.

Men sunnudagin kundi tað sum so gera tað sama, hvørjar skjúttar VÍF hevði at borðreiða við. Neistin hevði í Jotic ein sera væl upplagdan aftasta skansa, og longu fyrstu løtuna tóktist hann ætla, at máltalið hjá VÍF skuldi haldast langt niðri.

Eftir fyrsta korterið stóð longu 2-8 á máltalvuni, og tó at VÍF gjørdi ein vørr eftir hetta, so megnaðu teir ongantíð heilt at toga seg upp. Neistin svaraði hvørja ferð aftur, og tá teir bláu so í seinna hálvleiki skoraðu fimm ferðir á rað, var mest sum alt avgjørt. VÍF royndi at toga aftur seinastu løtuna, men munurin var vorðin stórur.

### Brendu ov nógv

Og eftir dystin var annar av venjarunum hjá VÍF, Hjalmar Klein Olsen, ikki í iva um, hvar stóri trupulleikin var.

- Vit brenna alt ov nógvar møguleikar. Í verjupartinum gera vit tað, sum vit ætlaðu okkum, og at Neistin skorar 24 mál er sum so eingin trupulleiki. Tað er t.d. tað sama, sum H71 skeyt móti okkum seinasta vikuskifti. Men vit skora ikki nóg væl sjálvir. So kanst tú altíð tosa um, hvørt tað er Jota, sum stendur væl, ella okkara, sum skjóta illa, men í øllum førum er úrtøkan alt ov lítil. Tað er so nakað, sum vit mugu arbeiða við til komandi dystirnar, helt Hjalmar um dystin.

Hinvegin var nógv at fegnast um hjá teimum bláu. Umframt teir tríggjar útlendsku leikararnar, sum umframt Jota eru Dragisa Stojovic og Blagoje Buha, so stóðu aðrir leikarar eisini sera sterkt í myndini. Ikki minst Áki Mørk, sum tók nógva ábyrgd á seg, tá vestmenningar fingu tak í útlendsku skjúttunum, og sum á hendan hátt í stóran mun var viðvirkandi til alla tíðina at halda trýstinum uppi.

### Stórdystur bíðar

Sum nevnt, so hevur Neistin við sigrinum toga seg upp á oddasessin í deildini. Komandi tveir dystirnar skulu teir spæla móti ávíkavist H71 og KÍF, og megna teir eisini at halda úrtøkuni í hesum dystum, fer av álvara at síggja ljóst út hjá teimum.

Hjá vestmenningum er einki at ivast í, at tapið skal vaskast burtur, men komandi uppgávan er tó av teimum allar truplastu. Tá skulu teir gulu nevnliga inn á Skála, har meistararnir úr StÍF taka ímóti. Og tað er væl at merkja eitt meistaralið, sum av álvara hungrar eftir stigum, nú teir taptu fyrsta dystin á árinum. Hetta líkist av sonnum einum stórdysti, har tvey av sterkastu mansliðunum í føroyskum hondbólti mugu berjast fyri lívinum, soleiðis at tey ikki verða koblaði av í oddastríðnum.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Neistin 22-24 (9-13)**
Málskjúttar
**VÍF:** Ingi Olsen 7(5), Agnar Joensen 4(1), Daniel Rápa 4, Sámal Joensen 2, Ólavur Brimnes 2, Harald Bjørgvin 1, John Zachariasen 1, Áki G. Olsen 1
**Neistin:** Blagoje Buha 7(3), Dragisa Stojovic 5(1), Aki Mørk 4 (1), Ragnar Stakksund 2, Dann Thorleifsson 2, Karl Oddmar Rasmusen 2, Helgi Michelsen 1, Helgi Justinussen 1
**Brotskøst:** VÍF 8, Neistin 5
**Útvísingar:** VÍF 1, Neistin 6
**Diskvalifikatión:** Neistin 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar úr H71:** Jákup Símun Simonsen & Høgni M. Joensen



Stjørnan-VÍF 23-26 (11-13):

# Undirhald um alt

**Umframt undirhaldinum frá heppigentunum hjá FCK, so gjørdist talan eisini um ein spennandi og dramatiskan dyst, tá Stjørnan tók ímóti VÍF sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Katarina Stepanovic er ætlað sum útlendsk álopshóttan hjá Stjørnuni, og hesa ferð megnaði hon í hampuliga stóran mun at seta sín dám á dystin*

Hóast talan var um dyst millum tvey av sterkastu kvinnuliðnum í landinum, so mundu tað vera karmarnir kring dystin, sum fingu størstu umrøðuna undan dystinum millum Stjørnuna og VÍF sunnudagin.

Sonevndu Cheer-leaders hjá FCK vóru komnar til landið, og eftir at hava heppað á HB og B36 leikarar á platform, var túrurin komin til Stjørnuna. Og heppikórið megnaði eisini at fáa lagið í KÍ-høllini upp i topp longu undan dystinum. Her er talan annars eisini um nakrar av bestu hondbóltsáskoðarunum í landinum, og tað fingu tey so eisini høvi at prógva, tá dysturin varð blástur ígongd.

### Revsaðu mistøkini

Men hóast dyggan stuðul til Stjørnuna, so gjørdist tað VÍF, sum fór avstað við stigunum sunnudagin. Liðið hevði loksins fingið innferðarloyvið hjá teimum báðum nýggju útlendsku leikarunum í rættlag, og hesar vóru avgjørt við til at seta sín dám á dystin. Eisini saman við teimum útlendsku hjá Stjørnuni, sum nú í nógv størri mun megnaðu at vera við í spælinum, enn tær vóru fyri viku síðani á Skála.

Og yvir høvur gekk ógvuliga javnt á. At kalla allan fyrra hálvleik skiftust liðini bæði um at hava leiðsluna, men tá VÍF seinastu løtuna undan steðginum fekk togað seg eitt lítið sindur avstað, tóktist hetta onkursvegna geva heimaliðnum eitt skot fyri bógvin.

Og í seinna hálvleiki megnaðu tær reyðu ongan tíð heilt av álvara at seta seg ígjøgnum. Ofta var tað nær við, og fleiri ferðir varð munurin at kalla togaður inn, men hvørja ferð varð alt arbeiðið so tveitt burtur við óneyðugum mistøkum. Hesi vórðu alla tíðina revsað av einum konstentreraðum VÍF-liði, og so hvørt sum minuttirnir gingu, so tóktist ein útisigur alt meira sannlíkur.

Og talan gjørdist so eisini um nakað av dramatikki, sum ivaleyst avspeglaði týdningin, sum liðini løgdu í dystin. Sostatt mátti Una Olsen gevast við einari eymari nøs, eins og Sóley Mikkelsen fekk onkran ordiligan sendara, men alt í alt var hetta tó ikki nakað, sum fekk vent dystargongdini. Vestmenningarnir hildu alla tíðina fast um leiðsluna, og við sigrinum hava tær fyri fyrst staðfest, at tað eru tær, sum eru avbjóðararnir hjá VB.

### Spennandi vikur fyri framman

Og ivaleyst fara næstu fáu umførini at vísa, hvussu stór hóttanin frá VÍF so er. Komandi vikuskifti vitja tær á Strondum, har Stjørnan misti stig fyri viku síðani, og síðani koma tey bæði høvuðsstaðarliðini á vitjan í Vestmanna. Tað skal VB eisini um nakrar vikur, og spurningurin er so, hvørt VÍF til ta tíð hevur spælt nýggju leikararnar nóg væl inn á liðið.

Hjá Stjørnuni tykist eisini greitt, at tað krevur nakað av tíð, áðrenn nýggju leikararnir av álvara eru partar av liðnum. Hesa ferð megnaðu tær so í væl størri mun at vera við í spælinum, og kunnu tær lyfta seg til at gerast eyka kryddið í sterka føroyska bulinum á liðnum, so kann væl vera, at Stjørnan komandi mánaðirnar fer at førka seg fram um triðja plássið, sum liðið í løtuni hevur á stigatalvuni.

### Dysturin í tølum

**Stjørnan-VÍF 23-26 (11-13)**
Málskjúttar
**Stjørnan:** Katarina Stepanovic 9(2), Annika Ljósstein 6(1), Joan M. Djordjevic 3, Una Olsen 2, Bára S. Klakstein 2, Anna Kristina Samson 1
**VÍF:** Sóley Mikkelsen 7(1), Irina Rodevici 6, Ioana Rápa 5(1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 5, Fríða Marjunardóttir 2, Finngerð Joensen1
**Brotskøst:** Stjørnan 4, VÍF 2
**Útvísingar:** Stjørnan 4, VÍF 6
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Uni Wardum



*Partur av undirhaldinum kring dystin var framførslan hjá FCK Cheer-leaders, sum vóru komnar á vitjan, og tær megnaðu eisini alt fyri eitt at lyfta annars góða stemningin í KÍ-høllini*

KÍF-H71 28-26 (17-12):

# Heimasigur til KÍF

**Damir Oros var tvey mál betri enn Henrik Gerster, og tað var eisini samlaði munurin eftir 2X30 minuttir**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einki er at ivast í, hvønn leikarar kollfirðingar hava sett størsta álitið til málskjóting á hetta kappingarárið. Damir Oros vísti seg í fjør at vera sannur fongur hjá liðnum, og tó at tað tók sína tið, so kom hann eisni til landið innan kappingarbyrjan í ár.

Og longu í fyrsta dystinum sýndi hann, at hann framvegis hevur skotarmin intaktan. Tíggju ferðirnar langaði hann bóltin í meskarnar hjá H71, og so hjálpti tað í hesum umfarinum lítið, at H71 hevur fingið sín størsta skjútta nakrantíð aftur á liðið. Talan er sjálvandi um Henrik Gerster, og tó at hann ikki longu hevur sama avsett, sum hann hevði fyrru ferðina hann var venjari í Hoyvík, so man tað vera fáur leikari, sum hevur somu skotstyrki í vinstru hond.

Leingi var eisini líkt til, at talan skuldi gerast um tvídyst teirra millum. Ein dystur sum Oros at enda vann, og einki er at ivast í, at tað eisini eru júst hesir báðir leikararnir, sum mótstøðuliðini skulu vara seg fyri, tá H71 ella KÍF eru mótstøðuliðini Á pappírinum er talan kanska um veikastu liðini hetta kappingarárið, men tað er einki at ivast í, at tey eisini í ár fara at gera onkran vørrin, og tað skal sum so ikki undra so øgiligt, um tey onkursvegna fara at gera munin á vágskálini, tá øll stigini verða tald saman í apríl mánaði.

### Dysturin í tølum

**KÍF-H71 28-26 (17-12)**
Málskjúttar
**KÍF:** Damir Oros 10(5), Petur Martin Poulsen 8, Mirko Milenkovic 3, Rógvi Weihe 3, Regin Petersen 2, Kristjan Madsen 1, Finn Heri Johannesen 1
**H71:** Henrik Gerster 8(3), Halgir Dahl Olesen 5, Johnny Durhuus 5, Niels Viggo Niclasen 4, Jákup á Borg 2, Olaf Vestergaard 1, Kristian Eli Zachariasen 1
**Brotskøst:** KÍF 7, H71 4
**Útvísingar:** KÍF 3, H71 2
**Dómarar úr Kyndli:** Geir Wardum & Gunnar Gregoriusen